# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.04.2016*

**Bygdaráðsfundur: 25.04.2016 kl. 16.00 til kl. 18.45**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 40/2016 Tilbúgvingarvirksemið**

J.nr 14.00.00-Ø09-2-15

**Málslýsing**

Ársroknskapurin fyri 2015 hjá Skálafjarðar Sløkkiliði er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| | **R 2015** | **R 2014** |
|---|---|---|
| Nettoinntøkur | 1.905.798 | 1.919.838 |
| Útreiðslur íalt | 1.565.038 | 1.741.889 |
| **Úrslit áðrenn avskriving/rentur** | **340.760** | **177.949** |
| | | |
| Avskrivingar | 232.639 | 231.562 |
| Rentur | 4.146 | 7.016 |
| **Ársúrslit** | **112.267** | **-46.597** |

**Tilmæli**

Á fundi 20.04.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2015, soleiðis sum hann er uppsettur.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 41/2016 Havnir og floghavnir**

J.nr. 08.03.25-P20-1-16

**Málslýsing**

Í skrivi 03.03.2016 søkir EJ Maskinur um grundstykkið sunnanfyri verandi neyst í Krabbur, sum er 9 x 6,4 m til støddar.

**Tilmæli**

At koyra málið aftur í nevnd fyri at viðgera ásetingina í byggisamtyktini fyri økið.

**Avgerð**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál nr. 42/2016 Parkir, frítíðar/ítróttarannlegg og lendisrøkt v.m.**
J.nr. 04.05.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 17.03.2016 vísir borgari á, sum eitt gott hugskot til trivnað hjá hundunum, at grótkastið verður útlagt til økið, har hundaeigarar kunnu fara túr við sínum hundum.

**Tilmælir**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd til, at borgarar í Nes kommunu kunnu ganga túr við sínum hundum, út eftir grótkastinum, og at fólk taka upp eftir hundunum.

Á fundi 19.04.2016 tekur Vinnunevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisk nevnd og Vinnunevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 43/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-9-16
**Málslýsing**
Í skrivi 06.04.2016 søkja Anita og Oddmar Tausen um byggiloyvi til úthús ímillum terassuna og garðin móti grannanum, matr. nr. 746f.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjarunum byggiloyvi eftir ávísum treytum:

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Súnfríð Jacobsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 44/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-10-16
**Málslýsing**
Í skrivi, móttikið 06.04.2016, søkir Jonhard á Regni um loyvi til at byggja uppí verandi seyðahúsið á Rituvíkshálsi matr. nr. 155d Nes hagi.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd til, at umsøkjarin fær loyvi til uppíbygging til seyðahúsið treytað av, at avvarðandi mynduleikar geva loyvi til uppíbyggingina.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 45/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-18-16
**Málslýsing**
Í skrivi, móttikið 14.03.2016, søkja Erla og John Dávur Djurhuus um loyvi at ogna sær lendið til grundstykki við Agnið, burtur av matr. nr. 109, 640 m² til støddar.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið at selja víðari til umsøkjararnar.

Elin á Torkilsheyggi var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Jóhannus Danieslen og Elin á Torkilsheyggi vóru úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 46/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-17-16
**Málslýsing**
Í skrivi 04.04.2016, søkja Vónbjørt Johannesen og Klávus Sólheyg um loyvi at ogna sær lendið til grundstykki við Hjallavegin, burtur av matr. nr. 383a.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið at selja víðari til umsøkjararnar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 47/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-p20-16-16
**Málslýsing**
Í skrivi 05.04.2016, søkja Maria í Túni og Bergur Hansen um loyvi at ogna sær lendið til grundstykki á Heygum, burtur av matr. nr. 616a og 408a, uml. 637 m² til støddar.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd frá, at umsøkjararnir fáa loyvi til at ogna sær lendið grundað á, at økið hevur verið ætlað sum fríøki og harumframt liggja bæði háspennings- og lágspenningskáplar á økinum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

*Eftirfylgjandi er støða tikin til, at málið verður viðgjørt av nýggjum.*

**Mál nr. 48/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-12-16
**Málslýsing**
Í 2014 gav Nes kommuna, handlinum Hjá Pidda, eitt prinsipielt byggiloyvi til uppíbygginga av einum duri og til at ogna sær lendið soleiðis, at umstøðurnar kundu gerast tryggari framman fyri handilin.

Handilin liggur fram við landsvegnum og hevur eitt ávíst samskifti verði millum Landsverk og eigaran av handlinum Hjá Pidda. Landsverk hevur sent eitt uppskot um avtalu til eigaran. Nes kommuna, sum er byggimynduleiki, er ein partur av hesi avtalu.

Avtalan er ein semja millum partarnar um eina samlaða loysn, bæði til ætlaðu útbyggini, sum søkt hevur verið um og eisini, sum ikki hevur minni týdning ferðsluliga at gera sýnið og plássið betur um norðurhornið á bygninginum.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Teknisku nevnd til at taka undir við avtaluni soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 49/2016 Havnir og floghavnir**
J.nr.08.03.25-P20-2-16
**Málslýsing**
Í skrivi 10.04.2016 søkir Teknistovan í Gøtu vegna Landingarmiðstøðina á Toftum um loyvi at byggja eitt íshús, 55 m² til støddar, sunnanfyri virkisbygningin á matr. nr. 435e.

**Tilmæli**
Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Landingarmiðstøðini á Toftum loyvi til at byggja eitt íshús suður frá virkisbygninginum, eftir ávísum treytum.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Niclas Davidsen var úti, meðan málið var viðgjørt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.04.2016*

**Mál nr. 50/2016 Alment virksemið**
J.nr. 00.32.-10-S08-4-15
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2015 hjá Skálafjarðarsamstarvinum er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| | |
|---|---|
| Inntøkur tilsmans | kr. 62.160.978 |
| Útreiðslur tilsamans (Netto) | kr. 62.160.978 |
| **Ársúrslitið** | **0** |

**Tilmæli**
Á fundi 20.04.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2015 soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 51/2016 Bókasavnsvirksemið**
J.nr.21.00.00-Ø09-1-16
**Málslýsing**
Fíggjarætlanin fyri 2017, hjá Bókasavninum í Nes kommunu, komin til ummælis, hjá kommununi.

**Tilmæli**
Á fundi 20.04.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2017.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 52/2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-2-15
**Málslýsing**
Viðgerð og góðkenning av grannskoðaða ársroknskapinum fyri 2015 hjá Nes kommunu, soleiðis sum hann er uppsettur av SPEKT.

Roknskaparleiðarin hjá Nes kommunu, framlegði roknskapin fyri bygdaráðnum.

**Avgerð**
Bygdaráðið viðgjørdi roknskapin, og hevði ikki ítøkuligar viðmerkingar. Bygdaráðið samtykti at góðkenna ársroknskapin fyri 2015.

*PS. Ársroknskapurin fyri 2015 sæst á heimasíðuni undi leinkjuni, kommunan í tølum.*

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.04.2016*

**Mál nr. 53/2016 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.32.10-S08-11-15

**Málslýsing**

Í desembur 2015 játtaði Løgtingi, Skálafjarðarsamstarvinum, pening, eftir at fíggjarætlanin fyri 2016 var samtykt í samstarvinum og kommununum. Stýrið fyri Skálafjarðarsamstarvinum hevur viðgjørt játtanina, og mælir stýrið til, at játtanin verður brúkt til neyðugur íløgur, sum standa fyri framman.

**Tilmæli**

Á fundi 20.04.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá stýrinum fyri Skálafjarðarsamstarvinum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Kunning:**

1. **Kvartal av roknskapinum fyri 2016 hjá Nes kommunu**

| **Rakstur** | **1.kv.** | **fíggjaræltan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 936.779 | 4.186.000 | 3.249.221 | 77,6% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 3.618.428 | 14.448.500 | 10.830.072 | 75,0% |
| §3 Børn og ung | 2.457.311 | 10.728.000 | 8.270.689 | 77,1% |
| §4 Undirvísing | 911.745 | 3.809.500 | 2.897.755 | 76,1% |
| §5 Mentan og frítíð | 749.030 | 2.712.000 | 1.962.970 | 72,4% |
| §6 Teknisk mál | 716.675 | 3.790.000 | 3.073.325 | 81,1% |
| §7 Kommunal virki | 543.194 | 2.493.500 | 1.950.306 | 78,2% |
| **Rakstur í alt** | **9.933.162** | **42.167.500** | **32.234.338** | **76,4%** |
| | | | | |
| §20 Inntøkur v.m. | -11.456.002 | -43.880.000 | -32.423.998 | 73,9% |
| | | | | |
| **Rakstur pr. 31.03.2016** | **-1.522.840** | **-1.712.500** | **-189.660** | **11,1%** |

| **Íløgur** | **1.kv.** | **fíggjaræltan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 320.000 | 320.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 862.805 | 2.656.500 | 1.793.695 | 67,5% |
| §4 Undirvísing | 14.446 | 0 | -14.446 | 0,0% |
| §5 Mentan og frítíð | 186.187 | 500.000 | 313.813 | 62,8% |
| §6 Teknisk mál | 37.013 | 779.100 | 742.087 | 95,2% |
| §7 Kommunal virki | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Íløgur í alt** | **1.100.451** | **4.255.600** | **3.155.149** | **74,1%** |
| | | | | |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-422.389** | **2.543.100** | **2.965.489** | **116,6%** |